Konsertir í Glyvra Kirkju og í Fríðrikskirkjuni

Nú sunnudagin 10. desembur verður konsert í kirkjuni á Glyvrum seinnapartin og í Fríðrikskirkjuni um kvøldið

Føroyskt jólaoratorium á Glyvrum
Sunnudagin 10. des. klokkan 16.00 ver›ur kórverki› "Føroyskt jólaoratorium" av Jóhan Mortensen framført í kirkjuni á Glyvrum. Verki› var› skriva› til jóla í fjør og frumframført í Frí›rikskirkjuni. Aftrat frumframførsluni vóru tvær a›rar konsertir. Nú skal hetta kórverki› so framførast á fyrsta sinni á Glyvrum, og ætlanin er at hava bert hesa einu framførsluna.

Verki› er upprunaliga skriva› fyri ferrædda› kór og strúkarar vi› tveimum tvørfloytum. Í kirkjuni á Glyvrum ver›ur verki› kortini framført vi› orgulfylgispæli og ikki vi› strúkarum. Ta› er Símun Hammer, organistur vi› kirkjuna í Gøtu, i› henda dagin kemur at sita vi› orgli›. Tær bá›ar, Bodil og Frí›hild, i› hava gjørt so nógv vart vi› seg innan musikklívi› á Skálafjør›inum, fara at spæla tvørfloytu. Sangararnir eru so at siga allir teir somu sum í fjør. Tvær duettir og tvær soloir eru í verkinum. Kvinnurøddina syngur Berghild Poulsen (Begga), og Hannis Hansen tekur sær av mansrøddini.

Konsertin í Frí›rikskirkjuni
Um kvøldi› klokkan 20.30 ver›ur so konsert í Frí›rikskirkjuni. Manskóri› á Skálafjør›inum, sum eisini syngur nakrar sangir til framførsluna á Glyvrum, eigur høvu›spartin av skránni í Frí›rikskirkjuni og fer at framføra bæ›i gamalt og n‡tt m.a. "Ave Maria" av Franz Schubert, har Marita Joensen fer at syngja solo saman vi› kórinum. Fylgispæli› til "Ave Maria" fer Andrea Mortensen av Argjum at hava.

Framhaldsdeildin í Runavík hevur vi› vælvild frá lei›slu og lærarum eitt skúlakór, i› einir fjøruti av næmingunum, i› har ganga, syngja vi› í. Skúlakóri› fer at syngja nakrar sangir saman vi› tónleikarunum Hjalta Joensen og Jákup Olsen. Maria og Morid, næmingar í musikkskúlanum, sleppa eisini at royna seg vi› tvørfloytunum. Kóri› fer eisini at syngja "Ave verum" av Mozart.

Ein ri›il av børnum syngur í skúlakóri í skúlanum á Glyvrum. Hesi børnini sleppa at syngja vi› í einum risastórum kóri, i› ver›ur manna› vi› sangarum úr Manskórinum, Jólaoratoriumskórinum, Skúlakórinum í Runavík og Skúlakórinum á Glyvrum. Hetta kóri› fer saman vi› tónleikarum at enda konsertina vi› trimum løgum.

Kórlei›ari hjá øllum kórunum er Jóhan Mortensen.

Frí›rikskirkjan



Norðborg II skift eigara

Í síðsti viku keypti VEAVÅG nótskipið »NorðborgII« frá Pf. Hvalnes í Klaksvík. »Norðborg II« verður helst veitingarskip

SKIPASØLA
Ólavur í Beiti

Í sí›stu viku undirskriva›u VEAVÅG í Havn og Pf. Hvalnes í Klaksvík sølusáttmálan um »Nor›borg II« sum longu fríggjadagin í sí›stu viku fór til Noregs, har ætlanin er at skipi› skal ver›a veitingarskip. VEAVÅG hevur nøkur skip í hesi vinnu, og sama felag keypti eisini í síni tí› »Ólav Halga«, sum sí›an var seldur ví›ari.

Seinast »Nor›borg II« var til fiskiskap var fyri Driftina í Gøtu, sum leiga›i »Nor›borg II« fyri »Jupiter«. »Nor›borg II«, fyrrverandi Nor›borg, er eitt av okkara kendastu nótaskipum og hevur veri› í hesi vinnu seinastu 30 árini. Í 1968 kom skipi› til Føroyar sum línubátur og æt tá »Nor›búgvin«.

Hvussu nógv VEAVÅG hevur keypt »Nor›borg II« fyri ver›ur ikki sagt, men av Pf. Hvalnes ver›ur uppl‡st, at bæ›i seljari og keypari eru nøgdir.

Nor› borg landar
Nú hevur Pf. Hvalnes so bara »Nor›borg« eftir sum í løtuni landar sild til matna í Klaksvík. Sum skilst á rei›arínum hevur »Nor›borg« gó› 600 tons inni, og væntandi ver›ur alt selt til Balticum. Prísurin liggur um einar 3 krónur kilo í løtuni.

Tí›indaskriv

Kanningardepil er fyrsta stig á leiðini

Føroyar kanska eru um at gerast ov seinar til at útnytta teir náttúrligu møguleikar, ið vit hava sum eitt lítið og isolerað fólk í gengranskingarhøpi, skrivar Vinnuhúsið frá fundi um gengransking

Vinnuhúsi› skrivar, at seinasta fríggjadag bjó›a›i Granskingarrá›i› til fund um gen-gransking. Andrew Higgins, sum er verkætlanarlei›ari hjá DeCode kunna›i um teirra gengransking, um framfer›arhættir og møguleikar. Aftaná kunna›i Hørdur Vardum um kynbótaarbei›i› hjá Fiskaaling innan laks, og á hvønn hátt gengransking kundi opna fyri n‡ggjum møguleikum á hesum økinum.

Or›askifti› eftir framløgunar vísti, skrivar Vinnuhúsi›, at Føroyar kanska eru um at gerast ov seinar til at útnytta teir náttúrligu møguleikar, sum vit hava, sum ein líti› og isolera› fólk í gen-granskingarhøpi.

Kanningardepil
Á fundinum kom fram, at arbeitt ver›ur í løtuni vi› ætlanum um ein kanningardepil, har partar av verandi kanningum hjá Heilsufrø›iligu Starvsstovuni, Landssjúkrahúsinum og Apoteksverkinum ver›a savna›ir. Ein slíkur kanningardepil er fyrsta stig á lei›ini um gen-gransking ella líknandi gransking skal kunna fara fram í Føroyum. Fundarluttakarnir vístu hesari verkætlan stóran áhuga.

Føroya Arbei›sgevarafelag metir máli› hava t‡dning, tí eitt munagott granskingarumhvørvi› í Føroyum hev›i eisini havt positiva ávirkan á t.d. matvørugransking, sum gerst ein alsamt meira t‡ andi táttur í kappingarførleikanum hjá vinnuni.

Tøgn
Fyri gott tveimum árum sí›ani var nógv kjak um gengransking í Føroyum. Ein verkætlan saman vi› íslendingum kundi fara í gongd, men avgjørt at bí›a vi› at gera naka› ítøkiligt, m.a. fyri at fáa eitt kjak um etisku vi›urskiftini, sum eru tengd at slíkari gransking. Sí›ani hevur líti› og einki veri› at hoyrt um máli›. Hinvegin frættist, at líknandi gransking fer fram, tó ikki í Føroyum, men uttanlanda, og ta› er væl at merkja, bló›royndir og uppl‡singar um føroyingar, sum er grundarlagi› undir hesari gansking uttanlanda.

Ongin orsøk er at stu›la gransking uttanlanda vi› føroyskum tilfari, tá i› vit sjálvir hava tørv á at uppbyggja vitan á hesum økinum, tí er at vóna, at hetta granskingarumvørvi› nú fæst til vega í Føroyum, skrivar Vinnuhúsi›.

ítróttur

Nr. 236 • hósdagur • 7. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo



Adriana Milodanovic skuldi mikudagin á skaðastovuna at taka gipsið av, og í Klaksvík vóna tey, at hon skjótt kann fara undir aftur hondbóltsvenjingina

Stjørnan-Kyndil 33-24 (22-12)

Stjørnan avgjørdi í fyrra hálvleiki

Serliga í fyrra hálvleiki tóktust nógvu landsliðsleikararnir hjá Kyndli tungar, og tá tær í seinna hálvleiki komu ígongd, var longu ov seint

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað tóktist ikki at vera tað stóra ivamálið, tá Kyndil týskvøldið vitjaði í Klaksvík.

Stjørnan legði seg beinan vegin framum, og størsta partin av fyrra hálvleiki togaðu tær seg alsamt longri frá Kyndli. Tá munurin var størstur, vóru 12 mál á muni, og hóast Kyndil síðani fekk minkað nakað um munin, so kom sigurin hjá klaksvíkingunum ongantíð í vanda.

Gekk væl
Annika Ljósstein, sum í fjør var liðskipari hjá Stjørnuni, men sum í ár hevur latið armbindið frá sær til Annu Kristinu Samson, segði eftir dystin, at tær vóru væl nøgdar um avrikið.

– Í fyrra hálvleiki gekk spælið ótrúliga væl fyri okkara viðkomandi. Tá kyndilsliðið so samstundis tóktist rættiliga tungt og ókonsentrerað, sluppu vit beinan vegin avstað, og ikki fyrr enn móti endanum av fyrra hálvleiki byrjaði ferðin at fella.

– Kanska vit tóku tað eitt sindur róligt í seinna hálvleiki, men í øllum førum var Kyndil nógv broytt tá. Tær spældu nógv skjótari og betri umhugsað, men eg haldi ikki, at tað nakrantíð var ivi um, hvør fór at vinna dystin, sigur Annika.

Tungt hjá landsliðsleikarum
Hon leggur annars afturat, at tað allar helst eisini hevði sítt at siga, at Kyndil hevur havt somikið nógvar leikarar á landsliðnum.

– Hjá okkum hevur bara Joan M. Joensen spælt við í landsdystunum, meðan vit aðrar hava havt frí frá hondbóltinum í tvær vikur. Tí gleddu vit okkum allar at koma á vøllin.

Annika leggur afturat, at tað hjá Kyndli tóktist vera púra øvugt. Kyndil hevði um vikuskiftið fýra leikarar við í landsliðshópinum, og hesar eru helst í størri mun enn tann eina hjá Stjørnuni berandi kreftir á liðnum.

Tá tær so hava nýtt somikið nógva orku til at fokuserað upp á landsliðsuppgávurnar, er ikki meira enn náttúrligt, at hetta merkist aftur í fyrstu landskappingardystunum.

Adriana á veg
Annars kundi Annika eisini bera tey gleðisboðini til viðhadlsfólkini hjá Stjørnuni, at tað nú fer at styttast, til Adriana Milodanovic aftur verður tøk hjá teimum.

Mikudagin fór hon á skaðastovuna, har gipsið skuldi takast av, og eftir hetta skuldi støða so takast til, hvussu og nær hon av álvara kundi fara undir venjingarnar.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
Stjørnan: Vesna Tomajek 9(3), Joan M. Joensen 5, Anna K. Samson 5, Annika Ljósstein 4, Una Olsen 4, Bára Skaale 3, Sólvá Eystberg 2, Rannvá Andreasen 1(1)
Kyndil: Jórun Ludvig 7(1), Ann Hansen 7(3), Anita Kjærbo 4, Signhild Petersen 3, Christina Holm 1, Brynhild Klein 1, Jensia Petersen 1
Brotskøst:
Stjørnan 4, Kyndil 6
Útvísingar:
Kyndil 3
Dómarar úr Tjaldri:
Kári Hansen og Dánjal Hansen

Fótbóltskapping fyri sjómenn

Millum jól og nýggjár verður innandura fótbóltskapping fyri sjómenn. Kappingin verður hildin í KÍ-høllini í Klaksvík

FÓTBÓLTUR
Eyðun Klakstein

28. desember fara sjómenn at kappast í innandura fótbóltskapping, sum verður í KÍ-høllini í Klaksvík.

Slík kapping var fyri fyrstu ferð í fjør, og hon eydnaðist so væl, at hon er langt síðani komin á skránni aftur í ár.

20 lið hava longu meldað seg til kappingina, og tað er líka nógv, sum vóru við í fjør. Stundir eru enn at melda seg til.

Treytirnar fyri at fólk kunnu verða við í kappingini er, at tey farna árið hava mynstrað í hvussu so er ein túr við einum skipi.

Eisini veitsla
Fyrireikarnir vóna, at tað í ár verða onkrar kvinnur við, tí kvinnur hava verið til skips við Næraberg farna árið.

Næraberg hevur meldað fleiri lið til kappingina, og umframt stóra trolaran hava eisini línuskip og onnur skip meldað lið til kappingina.

Upp til átta fólk kunnu vera á hvørjum liði, men bert fýra kunnu vera á vøllinum í senn. Kappingin verður skipað við innleiðandi umfari og finaluumfari.

Trý tey bestu liðini fáa steyp frá Skipalistanum til ognar, og vinnarin fær eitt ferðasteyp, sum Klaksvíkar kommuna hevur latið, í varveitslu til næsta ár.

Kappingin endar við borðhaldið í Skálanum, haðar allir luttakararnir verða bodnir um kvøldið.

Um onkur hevur hug at verða við í kappingini, er gjørligt at melda seg til á telefon 217739.

Coca-Cola kappingin

Komið er nú fram til fjórðingsfinalurnar í steypakappingunum í hondbólti, sum nú eitur Coca-Cola kappingin.

Lutakast hevur verið hjá HSF, og verða dystirnir í fjórðingsfinaluni hesir:

Kvinnur:
StÍF II-VÍF I
Stjørnan I-Sóljan I
Tjaldur I-VB I
Neistin I-Kyndil I

Menn:
H71 I-Neistin I
KÍF I-VÍF I
Kyndil I-Neistin II
StÍF I-VÍF II

Støðan 1. deild kvinnur

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1. VÍF	9	8 - 1 - 0	273	143	130	17
2. Stjørnan	9	8 - 1 - 0	257	193	64	17
3. VB	7	4 - 0 - 3	187	155	32	8
4. Kyndil	8	4 - 0 - 4	191	205	-14	8
5. Neistin	8	2 - 0 - 6	160	195	-35	4
6. Sóljan	9	1 - 1 - 7	179	237	-58	3
7. Tjaldur	8	0 - 1 - 7	119	238	-119	1